gult cyan magenta svart



# – Vit hava goldið ov nógv

*Billy Hansen, stjóri í nýggja telefon-felagnum TeleF, heldur, at prísirnir hava verið ov høgir seinastu árini, og telefonrokningarnar hava tískil verið hareftir. Hann væntar eina javna lækk-ing á telefonprísunum komandi tíðina*




*Billy Hansen frá TeleTænastuni vinstrumegin og Eythor Arnalds frá Íslandssíma høgrumegin hava í felag sett nýggja felagið TeleF á stovn*

**Mynd: Jens Kr. Vang**

STEFAN Í SKORINI

Týsdagin skrivaðu føroyska felagið TeleTænastan og Íslandssími undir sáttmála sínámillum um at fara undir at veita føroyskum brúkarum tænastur á telefonøkinum. TeleTænastan og Íslandssími hava í felag stovnað felagið TeleF. Samstundis varð sáttmáli eisini undirskrivaður við Ericsson, sum skal veita nýggja felagnum ta neyðugu útgerðina. Talan er um útgerð innan fjarskifti og samskiftiskerv.

Hetta er fyrstu ferð, síðan einkarrætturin varð avtikin í Føroyum, at Føroya Tele fær veruliga kapping. Onnur smærri feløg eru á marknaðinum. Hetta fer sjálvsagt at merkjast á pengapunginum hjá føroyingum.

**Lækkingin verður jøvn men munandi**

– Lækkingin verður væntandi jøvn, frá tí at kappingin veruliga byrjar, til prísurin er komin niður á eitt støði, har hann burdi verið, sigur Billy Hansen, stjóri í TeleF.

Tað er fyrst og fremst á uttanlandstelefoni, at prísirnir væntandi fara at lækka munandi. Billy Hansen væntar, at lækkingin verður eini 30% á uttanlandssamrøðum.

Innanlands verður lækkingin ikki eins stór, men tað verður framvegis ein lækking

– Vit leggja okkum allatíðina eftir at vera bíligari enn kappingarneytin, sigur Billy Hansen.

Nú prísirnir væntandi fara at lækka er sjálvsagt upplagt at spyrja, um vanligi brúkarin hevur goldið ov nógv seinastu árini.

– Tað er eingin ivi um, at prísirnir hava verið nógv ov høgir. Tað haldi eg eisini, at flestu føroyingar eru á einum máli um, at vit gjalda ov nógv fyri telefoni. Vit gjalda í øllum førum nógv meira enn tey í grannalondum okkara fyri allar slíkar tænastur, sigur Billy Hansen.

Billy Hansen sigur eisini, at ein av orsøkunum, til at hann fór í gongd við TeleTænastuna í 1994, var, at hann legði merki til, at prísirnir vóru nakað høgir í mun til í grannalondunum. TeleTænastan hevur síðani ment seg til tað, hon er í dag. Tað skerst tó ikki burtur, at teir eisini eru farnir í gongd við hesa ætlanina, tí peningur er at vinna á økinum.

Løgtingið hevur avtikið einkarættin á hesum økinum, og úrslitið sæst nú aftur. Fleiri feløg eru sett á stovn við tí endamáli at bjóða tænastur innan telefoni. Hetta hevur eisini við sær, at prísurin lækkar.

– Persónliga havi eg ta áskoðan, at einkarætturin ikki tænir nøkrum endamáli, og tí er tað gott, at vit endiliga eru sloppin av við hann, leggur Billy Hansen afturat.

**Føroya Tele verður ikki eftirbátur**

Andras Róin fegnast um, at ein veruligur kappingarneyti nú endiliga er komin á marknaðin, sum Føroya Tele enn hevur 100% av. Hann er tó ikki samdur í, at føroyski brúkarin hevur fingið eina ov stóra telefonrokning seinastu árini.

– Eg haldi ikki, at brúkarin hevur goldið ov nógv, tí um hugt verður at ársroknskapunum hjá Føroya Tele, so hava vit jú seinastu trý árini skorið prísirnar niður í ein helming á øllum økjum, men hóast tað hevur úrslitið verið hækkandi, sigur Andras Róin, stjóri á Føroya Tele.

Síðan uttanlandssamskiftið varð yvirtikið 1998 frá Danmark, er tað vorðið nógv bíligari hjá Føroya Tele at bjóða tænastur.

– Tað er vert at nevna í hesum sambandi, at vit hava lækkað prísirnar seinastu trý árini. Vit fara eisini at halda áfram við at lækka prísirnar framyvir, sigur Andras Róin, stjóri í Føroya Tele.

Hann dylur tó ikki fyri, at nýggja kappingin er við til at skunda undir príslækkingarnar. Føroya Tele hevur í umbúna at lækka prísirnar á uttanlandssamskifti munandi í næstum.

TeleF verður tó ikki bara kappingarneyti, men kann eisini gerast ein samstarvsfelagi. Føroya Tele og TeleF vóru mikumorgunin á fundi, og Andras Róin væntar, at partarnir kunnu samstarva á onkrum økjum, t.d. við at gera felags íløgur í dýra útgerð.

**Byrja í næsta mánaða**

Nýggja felagið fer væntandi í næsta mánaða undir at bjóða føroyingum innan- og uttanlands telefonsamskifti, internettænastur og datatransmissión bæði til vinnulívið og vanliga brúkaran. Seinni verður eisini farið inn á fartlelefonmarknaðin.

Billy Hansen sigur, at orsøkin, til at sáttmáli varð gjørdur við íslendskt felag, var, at felagið frammanundan hevur holla vitan á økinum, og hetta kemur TeleF til góðar. Kapitalurin kundi verið fingin til vega her í Føroyum, men torført hevði verið at fingið sama knowhow.

Íslandssími og TeleTænastan eiga hvør sín helming av TeleF. Av teimum fimm limunum í nevndini, eru tríggir úr Føroyum. Micheal Jackson, formaður, og Ari Johansson eru úr Íslandssíma. Billy Hansen, Bjørn á Heygum og Kristian Kristiansson eru føroysku umboðini. Kristian Kristiansson er eigari av íslendska felagnum Radiomiðum, sum eigur helvtina av TeleTænastuni, meðan Billy Hansen eigur hina helvtina.

TeleF sigur seg kunna hava fingið 10-20% av føroyska marknaðinum innan eitt ár. Í TeleF fara væntandi eini 12 fólk at starvast. Til samanberingar kann nevnast, at í Føroya Tele eru 220 ársverk og 250 starvsfólk.


ÚTBERARAR
í Vági



Søkt verður eftir fólki at bera bløð út í Vági

Áhugað ringið
tlf. 211201
millum kl. 9 og 17
ella sendið
fax til 341201

Prentmiðstøðin
Smyrilsvegur 13 - Postboks 3019, 110 Tórshavn

– Dimmalætting tlf. 341200 –





DAGFØR
TEG
sosialurin
HALT
SOSIALIN

Tekna teg sum haldara, so fært tú sosialin 5 ferðir um vikuna til dyrnar

Tíðindablaðið
sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið *5 ferðir um vikuna.*

Navn:
Búst.:
Postnr., bygd, býur:
Tlf.:
Undirskrift:

☐ Haldarar í Føroyum: 360,-/ársfj.
☐ Haldarar í Europa: 510,-/ársfj.
☐ 5 bløð einaferð um vikuna í Europa: 425,-/ársfj.
☐ Onnur lond: Ymiskir prísir
☐ Internet: 240,-/ársfj.

Í býin
- altíð eitt stað at fara

Streymoy

Kaggin
Fríggja-og leygarkvøldið spælir
ÓLAVUR ØSTER BAND
5'ARI
frí.-, leyg.- og sunnukvøld frá kl. 17.00
Kaggin
www.kaggin.fo
Sosialurin - 311820

NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen
Leygarkvøldið:
• Úr Vestmanna kl. 24
• Úr Tórshavn kl. 01
• Úr Vestmanna kl. 04
• Úr Tórshavn kl. 05
(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð, tá fráboðan fyriliggur)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu
Tlf. 424254
Bussarnir:
Tlf. 287752 • 286254

fk Mat-seðilin
Hósdagin 5. okt.: Hamburgarryggur
Fríggjadagin 6. okt.: Kotelettir
Leygardagin 7. okt.: Oksasteik
Mánadagin 9. okt.: Kjøtbollar í karrysós
Týsdagin 10. okt.: Fiskafrikadellir
Mikudagin 11. okt.: Hakkibúffur
Kostnaður 32,- kr.
***
Seinnaparts-TILBOÐ
frá kl. 14.00:
Juniorburgari 14,95
Maxiburgari *ella*
Búffsandwich 19,95
Matstovan í Hoyvík

AUTO
- Dag sum nátt -
- skjótt og gott -
Skalt tú bil hýra
- so er tað 311234
AUTO
BENZIN
DIESEL
KIOSK
- ALTDØGNIÐ -
AUTO
311234

Lesið
sosialin
sosialin
sosialin
-tað loysir seg

Norðoyggjar

Klaksvíkar Klubbi
Dansur verður leygarkvøldið 7. oktober
"FLUFFY TOYS" spæla
Klubbin hevur:
POOLBORÐ
BILLARDBORÐ
ENSKAN FÓTBÓLT Á SKY

Í BÝIN
Fylgið við hvat hendir kring oyggjarnar í vikuskiftinum
sosialurin


Vilja tygum vi› í

*Í b‡in* - hvønn hósdag

Ynskja tygum at l‡sa í teiginum ***í b‡in***, so fylli› út henda lepan og sendi› hann til **Sosialin, box 76, 110 Tórshavn** – ella fax 314720

Tekstur